# Tað tyktist láturligt

**Terji minti um barnaløtuna, Eyðun var fjákuttur meðan Uni var sannførdi. So bersøgin er ummælarin hjá donsku tónleikaheimasíðuni Lydhør, í ummæli av prixbólkunum**

PRIX
*Niels Uni Dam*

Ummælarin var ein av teimum, sum var dómari í Prix Føroyar finaluni. Og tað er ikki við mýkindum, at hann ummælur okkara fremstu føroysku bólkar.

Tónlistarliga heldur hann Terja Rasmussen Band verða væl fyri. Tónleikin kallar hann meturvøru popp, og heldur at Terji við einum donskum lagi, hevði verið eitt gott boð uppá ein Melodi Grandprix vinnara.

Men handverkararklæðini og stigan hjá Terja, hevur hann ikki skilt. Hann samanberð pallframførsluna við barnaløtuna. Hann heldur, at tað er láturligt, at topproffesionellir tónleikarar, megna at finna uppá eitt so vánaligt show.

Eyðun Nolsøe og Showmenn fáa av grovfílini. Lagið, "Strúka skjótt framvið" verður rópt søtsuppa, og ummælarin heldur, at man eitt sindur ov tíðiliga hoyrir, at lagið "Easy" hevur verið íblástrurskelda. Hann sigur seg ikki vera imponeraðan. Annað lag heldur hann vera eitt sindur betri, meira útvarpsvinarligt, við íblástri úr enskum rokki. Lagið »So nógvar røddir« heldur ummælarin vera fjákutt. Hóast hann skilur, at hetta er aftursvar til kritikkin av, at teir gomlu luttaka.

Go Go Blues, fáa rættuliga góð orð við á vegnum. Ummælarin skrivar, at bólkurin spælir sannførandi, og at teir eru tann av bólkunum, sum hevur tað mest altjóða ljóðið. Men hann ivast í, um bólkurin fer at megna at gera seg galdandi á altjóða pallinum. Tí teirra bluespoppur er dekan ov neutralur.

Ummælið er at finna á heimasíðuni: www.lydhoer.dk

## Sangarin var elendigur

Í sambandi við Atlantic Music Event, skipaði Mentanarhúsið í Fuglafirði fyri eini konsert, har bólkar, sum ikki komu í Prix finaluna sluppu at spæla fyri útlendsku gestunum. Bólkarnir Braquet, Sic, Paradox, Direct Level og Side Effect luttóku. Eisini vóru Prixvinnararnir 2003, Gestir við.

Ummælarin hjá donsku tónleikaheimasíðuni Lydhør var á konsertini og ummælir tiltakið á www.lydhoer.dk

Hann heldur, at tann einasti av hesum bólkum, sum kundi klára seg uttanlands er Gestir. Hinir bólkarnir eru ikki klárir enn, hóast teir spæla væl.

Hann heldur tó Paradox vera rættuliga forvitnisligar, og skrivar, at teir kanska við sínum unga aldri kundu verðið eitt hitt.

Hinir bólkarnir fáa eisini góð orð, allir uttan Side Effect, har hann bersøgið sigur: At hóast bólkurin spælir: "en hård omgang Prodigy-techno-rock med svulstige sirenetoner på halvtung konventionel rock", so var sangarin so elendigur, at tað var syrgiligt.

**-NuD**



*Teir spældu knasandi væl. Men okkurt manglaði. Kanska var tað kenslan av at spæla næstseinasta settið saman nakrantíð, sum var løgin. Eg veit ikki*

# Tá ein dinosaurus doyr

**Ein av Føroya best umtóktu dansibólkum Fluffy Toys gavst leygarkvøldið. Bólkurin hevur seinastu árini verið millum virknastu bólkar í landinum**

FARVÆL
*Niels Uni Dam*

Við sínum blandi av dansivinarligum tónleiki, 70'ára rokki og langhærda garrvilla sangara, hava teir spælt seg beint inn í hjørtuni á føroyingum. Eg setti meg í Snar og koyrdi til Fuglafjarðar fyri at hoyra og síggja hvussu ein dinosaurus doyr.

Tað er synd at siga, at nógv fólk vóru í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið og søgdu farvæl við Fluffy Toys. Men tey sum vóru har, dansaðu og svingaðu, sum ongantíð fyrr, tá bólkurin leveraði vøruna. Men heldur ikki nógv meira enn tað, í øllum førum ikki fyrstu løtuna.. Fyrsta settið hjá bólkinum, var væl spælt og koyrdi stak væl. Uttan tó ordiliga at fara á flog. Tað tyktist, sum um bólkurin spældi væl, og sangarin sang væl, men ikki heilt saman. Kemiin manglaði á onkran hátt. Hetta kemst kanska av, at tað er langt síðan teir allir seinast spældu saman. Meðan allir uttan sangarin júst hava luttikið í prixnum undir navninum EGR2PLZ.

Løgini vóru melodisk rokkløg, har var alt frá Beatles, til Gary Moore, Deep Purple og Breakfast at Tiffanys, dansivinarligur syngið við tónleikur fyri rokkelskarar. Nøgdsemi var stórt millum áhoyrarnar, og dansiprosenti var sera, sera høgt.

Men sum heild tyktist bólkurin mettur. Sum um hetta síðsta kvøldið bara skuldi avgreiðast. Aftan á nógv ár saman, hevði eg vænta at løtan fór at verða meira sorgblíð. Dinosaurusurin tyktist bara at bíða eftir deyðanum.

Ikki tí, at teir spældu illa. Teir spældu knasandi væl. Men okkurt manglaði. Kanska var tað kenslan av at spæla næstseinasta settið saman nakrantíð, sum var løgin. Eg veit ikki.

Men okkurt hendi í steðginum. Seinna sett varð nógv betur. Bólkurin virkaði meira tendraður, sum um teir vildu njóta hesa síðstu løtuna saman. Alt koyrdi bara eitt vet betur. Tað tyktist sum um teir funnu saman í eini hægri eind.

Røddin hjá Einar byrjaði tó tíðiliga í settinum, at ganga fyri. Men hann kom í gongd aftur, og sang bólkin í gjøgnum "The wall" fram til tann stóra endan, sum varð fyrst "Summer of 69" og síðan "We're not gonna take it".

Í seinasta lagnum varð tað rokk'n'roll fyri allar pengarnar, við gittar fektan, og trummusláðara sum stóð uppi á stólinum. Fluffy Toys vórðu lagdir í grøvina. Men við pallin stóðu ungir menn, og róptu umaftur, umaftur og umaftur. Men eingin kom.

Fluffy Toys vóru søga. Spurningurin er so, um hetta var endin á 70'ára rokki her á klettunum. Ella um EGR2PLZ, sum er Fluffy Toys minus sangaran pluss Jóan Petur Andreassen á Hammond, megna at lyfta arvin, ella um teir tíma at lyfta arvin. Alt hetta fer tíðin at vísa.



*Í seinasta lagnum varð tað rokk'n'roll fyri allar pengarnar, við gittar fektan, og trummusláðara sum stóð uppi á stólinum*